MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið

Dagfesting: **17. januar 2018**
Tygara ref.:
Máltal.: **17/00828-1**

**Løgtingsmál xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fírskúlar**
(fírskúlar ikki partar av almennu fyrisitingini, umsitingarligar broytingar og nágreiningar)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fírskúlar
(fírskúlar ikki partar av almennu fyrisitingini, umsitingarligar broytingar og nágreiningar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 46 frá 26. mars 2002 um fírskúlar, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 6, verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Fírskúlar verða ikki roknaðir sum partur av almennu fyrisitingini, og tískil kunnu hvørki land ella kommunur ábyrgjast fyri atgerðir hjá fírskúlum."
Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.

**2.** Í § 9, stk. 3 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fírskúli hevur skyldu til at geva heimstaðarkommununi boð sambært 1. pkt."

**3.** § 11, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ella annar av landsstýrismanninum heimilaður stovnur veitir næmingunum í fírskúlunum tímar til serligan tørv eftir somu reglum sum næmingum fólkaskúlans."

**4.** Í § 14, stk. 1 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Fyri stýrislimir eru vanligar reglur um endurgjaldsábyrgd fyri nevndarlimir galdandi."

**5.** § 18, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Landsstýrisins stuðul verður útroknaður sum 85% av miðalkostnaðinum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum. Tímar til serligan tørv verða játtaðir serstakt, og eru tí ikki partur miðalkostnaðinum sambært 1. pkt. Stuðulin verður latin einstaka fírskúlanum í mun til tey í stk. 3 nevndu næmingatøl. Landsstýrið letur ikki stuðul til forskúlaflokkar í fírskúlum."

**6.** § 18, stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Fírskúli skal lata landsstýrismanninum fyribils næmingatal fyri komandi skúlaár tann 15. februar og endaligt næmingatal tann 1. september í sama ári."

**7.** § 18, stk. 5, 6 og 7 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 5.* Kommununnar stuðul til næmingar í fírskúlum verður útroknaður eftir kommununnar rakstrarútreiðslum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum í

kommununi. Stuðul til hvønn næming í frískúlanum er 85% av rakstrarútreiðslum fyri hvønn næming í fólkaskúlanum í viðkomandi kommunu. Avdráttur, renta og leiga eru ikki íroknað rakstrarútreiðslunum. Kommurnar boða frískúlanum frá, hvat rakstrarútreiðslan fyri hvønn næming í fólkaskúlanum hjá kommununi er.
*Stk. 6.* Skúlin boðar Føroya Gjaldsstovu frá parti kommununnar av rakstrarútreiðslunum sambært stk. 5. Við ársenda býtir Føroya Gjaldstova rakstrarútreiðslurnar millum kommunurnar eftir heimstaðnum, næmingarnir sambært landsfólkayvirlitinum høvdu 1. september.
*Stk. 7.* Eru eingi rakstrartøl fyri kommunalu rakstrarútreiðslurnar sambært stk. 5 og 6, roknar Føroya Gjaldstova eitt miðaltal út við grundarlagi í fimm teimum størstu kommununum."

**8.** Í § 19 verður stk. 2 strikað.

**9.** § 21 verður strikað.
§ 23 verður eftir hetta § 21.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. aug. 2018.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsøkir til uppskotið

Uppskotið verður gjørt, tí tað leingi hevur verið tørvur á at gera fráskúlalógina greiðari á ymsum økjum, herímillum at fríksúlar eru skipaðir sum sjálvsognarstovnar, og tí eru teir ikki partur av almennu fyrisitingini. Heldur ikki eigur at bera til at kæra avgerðir hjá einum privatum sjálvsognarstovni til landsstýrismannin, eins og innlitslógin og reglarnar um partsinnlit í fyrisitingarlógini heldur ikki eiga at galda fyri privatar sjálvsognarstovnar. Harumframt hevur lógin verið ógreið at umsita í Mentamálaráðnum, og tískil verður skotið upp, at umsitingin av fráskúlunum verður broytt soleiðis, at stuðulin verður útroknaður sum 85% av miðalkostnaðinum, sum er árligu nettoútreiðslan á fíggjarlógini til fólkaskúlan býtt við tal av næmingum í fólkaskúlanum. Talvan niðanfyri vísir stuðulin, sum hann hevur verið tey seinastu árini við støði í galdandi lóg, og hvat stuðulin hevði verið, um stuðulin hevði verið latin sum 85% av tí, sum ein miðalnæmingur kostar í fólkaskúlanum. Her verður fyrivarni tikið fyri, at skúlaár og fíggjarár ikki fylgjast, og at tað er gjørd ein broyting í 2011 í sambandi við stuðulin frá Sernámi.

Miðalkostnaðurin verður roknaður sum árliga nettoútreiðslan á árligu fíggjarlógini tilkontu 7.23.2.01.20 Fólkaskúlin(rakstrarjátta) býtt við næmingatalið. Tá er alt tikið við so sum eftirútbúgving, sjúka, menningartiltøk o.s.v.

| ár | næmingar í virkandi fríksúlum | stuðul í tkr. sambært galdandi lóg | stuðul sambært uppskot um 85% av miðalkostnaði í tkr. | munur |
|---|---|---|---|---|
| 2009 | 43 | 1.058 | 1.442 | -384 |
| 2010 | 57 | 1722 | 1.721 | 1 |
| 2011 | 75 | 2437 | 2.584 | -147 |
| 2012 | 77 | 2913 | 2.686 | 227 |
| 2013 | 86 | 3372 | 2.982 | 390 |
| 2014 | 103 | 3552 | 3.691 | -139 |
| 2015 | 118 | 4052 | 4.309 | -257 |
| 2016 | 133 | 4648 | 4.746 | -98 |

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo




**1.2. Galdandi lóggáva**
Ivi hevur ofta verið um, hvørt fróskúlarnir eru partur av almennu fyrisitingini. Tað hevur valla verið upprunaliga ætlanin við lógini, men av tí at fríksúlarnir eru undir eftirliti og regulering av tí almenna, og teir í stóran mun fáa almennan stuðul, ber til at tulka rættarstøðuna soleiðis, at landsstýrið t.d. eigur at vera ábyrgdað fyri ósakligar uppsagnir, lønarkrøv um fríksúli fer á húsagang o.a., ið landsstýrið onga ávirkan hevur á. Við uppskotinum verður hetta gjørt munandi greiðari við tað, at tað er greitt ásett, at fríksúlarnir eru ikki partur av almennu fyrisitingini. Ein avleiðing av hesum er eisini, at tað ikki eigur at bera til at kæra avgerðir hjá einum privatum sjálvsognarstovni til landsstýrismannin, eins og innlitslógin og reglarnar um partsinnlit sambært fyrisitingarlógini ikki eiga at galda fyri privatar sjálvsognarstovnar, sum støðan annars er í dag.

Harumframt hevur ein atfinning verið, at lógin er ov ógreið í mun til landskassastuðulin til forskúlaflokkar í fríksúlum. Hetta verður nágreinað, so tað er púra greitt, at landið ikki letur stuðul til forskúlaflokkar, tí sambært fólkaskúlalóggávuni eru forskúlar reint kommunalir. Harumframt er galdandi lóg alt ov tung og ógreið at umsita, og tískil verður hetta broytt samsvarandi tí, sbr. pkt. 1.1 omanfyri.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**
Endamálið er at dagføra lógina frá 1. aug. 2003, eins og endamálið er at gera lógina greiðari og lættari at umsita.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Ásetingarnar um stuðulsveiting verða greiðari, og stuðulsmóttakarin fáa betri innlit í stuðulsveitingina. Harumframt verður gjørt greitt, at fríksúlar eru ikki partur av almennu fyrisitingini, og tískil kann landið t.d. ikki ábyrgdast, um fríksúli fer á húsagang. Av tí sama koma fríksúlarnir ikki undir reglurnar um innlit sambært innlitslógini og fyrisitingarlógini, og tað fer ikki at bera til at kæra avgerðir fríksúlans í eitt nú starvsfólkamálum til landsstýrismannin. Hetta fer alt fram á privatrættarligum grundarlagi.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:

Frískúlanum í Havn
Lítlaskúla
Frískúlanum Keldan
Føroya Lærarafelag
Kommunufelagnum
Fíggjarmálaráðnum

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingarnar fyri land og kommunur
Uppskotið verður ikki mett at hava stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunu í mun til, hvussu skipanin verður umsitin í dag.

### 2.2. Umsintingaligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyri landið verður skipanin greiðari at umsita. Fyri kommunurnar verður broytingin tann, at tær upplýsa fara at upplýsa miðalkostnað fyri hvønn næming í kommununi til skúlarnar heldur enn Mentamálaráðið.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið verður ikki mett at fáa avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
1) Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tann evropiska mannarættindasáttmálan

2) Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Marknaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur nakrar kendar marknaforðingar við sær.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ongar tílíkar ásetingar.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um beinleiðis ella óbeinleiðis skattir.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki beinleiðis ásetingar um gjald.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**
Nei.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei.

**2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greina

**Til § 1**
Til nr. 1:
Broytingin hevur við sær í mun til galdandi rætt, at frískúlar við vissu fella uttanfyri almennu fyrisitingina. Hetta hevur verið ein afturvendandi spurningur, tí hóast frískúlarnir eru stovnsettir á privatrættarligum grundarlagi, eru teir undir nógvum almennum eftirliti og regulering. Tískil hevur ivi ofta verið um, hvørt tað almenna t.d. heftir fyri lønarkrøv o.a., um ein frískúli t.d. fer á húsagang. Tað hevur valla verið ætlanin við frískúlalógini at gera eina skipan, har tað almenna í síðsta enda kann ábyrgdast fíggjarliga fyri atgerðir, sum tað almenna so at siga onga ávirkan hevur á. Tað almenna veitir ein stuðul, og tað almenna hevur eitt eftirlit við frískúlunum. Tískil er endamálið við uppskotinum at gera tað púra greitt, at frískúlar fella uttanfyri almennu fyrisitingina.

Til nr. 2:
Sum er, hevur ivi verið um, hvør hevur fráboðanarskylduna: Skúlin ella landið. Tískil er tað við uppskotinum gjørt greitt, at tað er einstaki frískúlin, ið skal boða heimstaðarkommununi frá um tey børn í kommununi, ið eru innskrivað í fríkúlan.

Til nr. 3:
Við broytingini verður tað landsstýrismaðurin og ikki Sernámsdepilin, ið veitir tímar til serligan tørv. Tó kann landsstýrismaðurin delegera hesa heimild til annan stovn undir sær, um tørvur skuldi verið á tí. Sbr. eisini viðmerking til nr. 5.

Til nr. 4:
Í mun til galdandi rætt er støðan tann, at endurgjaldsábyrgdin hjá stýrislimunum bert stendur í viðmerkingunum til greinina. Sostatt hevur ivi verið um, hvørt stýrislimir kunnu ábyrgdast við støði í nøkrum viðmerkingum til lógina. Fyri at beina allan iva av vegnum verður gjørt greitt, at stýrislimir kunnu ábyrgdast sambært vanligu reglunum fyri nevndarábyrgd, sum tað eisini ber til at tryggja seg ímóti.

Til nr. 5:
Í galdandi lóg er eisini ásett, at "stuðulin svarar til 85 % av góðkendu læraralønunum, útroknaður eftir lutfalsliga sama formli sum í fólkaskúlanum". Fólkaskúlar fáa ikki tillutað játtan í pengum, men í tímum, sum so sláa út í útreiðslum alt eftir, hvussu starvsfólkahópurin er samansettur, og hvørji tiltøk so sum eftirútbúgving o.a. starvsfólkini luttaka í.

Meiningin við frískúlum er, at teir skulu hava frælsi at ráða sær sjálvum innan fyri ávísar karmar, og er tí trupult at umsita lógina og stuðulin eftir orðingini: **útroknaður eftir lutfalsliga sama formli sum í fólkaskúlanum**.

Uppskotið leggur upp til eina munandi greiðari umsiting, soleiðis at fríkúlarnir fara at fáa stuðul svarandi til 85% av miðalkostnaðinum fyri ein fólkaskúlanæming í fólkaskúlanum á hvørjum ári. Tímar til serligan tørv eru ikki við í hesum miðalkostnaði. Tá leiðslan á einum fríkúla kennir næmingatalið, hevði hon neyvt vitað, hvat stuðulin fór at verða, og kundi tillagað virksemið til ta

peningajáttan, næmingatalið gevur. Teir tímar, sum hava verið játtaðir av Sernámi, skulu framvegis ikki teljast millum nettoútreiðslurnar, og tí skulu teir tímarnir framvegis játtast serstakt til teir næmingar, ið hava serligan tørv. Sambært uppskotinum verður tað landsstýrismaðurin ella undirliggjandi stovnur, ið fer at tilluta hesar tímar.

At enda skal sagt vera frá, at tað hevur verið tulkingarivi millum Mentamálaráðið og Kommunufelagið, hvørt landskassastuðulin eisini skal latast til forskúlaflokkar í frískúlum, tí ásett er í § 2, stk. 2 í lógini, at landsstýrismaðurin kann loyva, at forskúlaflokkar koma undir lógina við teirri lógfylgju, at teir hava eins rætt til landskassastuðul og onnur flokstrin.

Sjónarmiðið hjá Mentamálaráðnum er, at stuðulin sambært § 18, stk. 2 í lógini verður roknaður eftir "lutfalsliga sama formli sum í fólkaskúlanum", og sambært fólkaskúlalóggávuni eru forskúlar reint kommunalir soleiðis, at forskúlaflokkar í frískúlum ikki hava rætt til landskassastuðul. Við uppskotinum verður tann ivin beindur burtur.

Til nr. 6:
Eins og í fólkaskúlanum verður næmingatalið brúkt sum grundarlag undir tímajáttanini. Fyribils metingin verður latin landsstýrismanninum tann 1. febr., og endaliga uppgerðin verður latin landsstýrismanninum tann 1. sept. í sama ári.

Til nr. 7:
Í dag leggur landið út fyri kommunustuðulin, sum frískúlar fáa, fyri síðani at skula krevja kommunurnar eftir upphæddini aftur. Frískúlar hava næmingar úr nógvum kommunum, og er tí neyðugt, at Mentamálaráðið samskiftir við nógvar instansir fyri at krevja endurgjald fyri tað, sum landið hevur lagt út. Skotið verður, at kommunurnar boða frískúlunum frá miðalkostnaðinum fyri hvønn fólkaskúlanæming í kommununi, og frískúlarnir boða Gjaldsstovuni frá, hvørjar upphæddir hjá kommununi skulu haldast aftur.

Til nr. 8:
Við nýggju skipanini verður tað ikki longur aktuelt at hyggja eftir sáttmálasettu lønini, tí næmingatalið og tímarnir verða tað avgerandi fyri, hvussu nógvan árligan landskassastuðul, ið ein frískúli hevur rætt til. Sostatt verður skotið upp at strika nevndu ásetingar.

Til nr. 9:
Av tí at frískúlarnir við fullari vissu fella uttanfyri almennu fyrisitingina, eigur tað ikki at bera til at kæra avgerðir hjá frískúlunum til landsstýrismannin. Landsstýrisðaurin fer framhaldandi at hava eftirlit við frískúlunum, og tískil fer tað framvegis at bera til at *klaga* eitt nú námsfrøðilig viðurskifti til landsstýrismannin. Tá ið ein stovnur fellur uttan fyri almennu fyrisitingina, er tað ikki í tráð við galdandi rætt, at innlitslógin og partar av fyrisitingarlógini eru galdandi fyri frískúlar. Landsstýrismaðurin fer framvegis í sambandi við eftirlit at hava heimild til at biðja um um allar neyðugar upplýsingar um næmingar, lærarar, undirvísingina og skúlans rakstur, sbr. § 7, stk. 2 í galdandi frískúlalóg.

**Til § 2**

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • ✉ mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

Lógin kemur í gildi, tá ið skúlaárið 2018/-19 byrjar, og skúlaár byrjar sambært fólkaskúlalógini altíð tann 1. aug.

Mentamálaráðið, xx. januar 2018.

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3:

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
☏ +298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo